## DAGSINS MEINING

# Vandi á ferð

So hendir helst tað, sum so mong hava borið ótta fyri – í kjalarvørrinum á afturvalinum av amerikanska forsetanum George Bush – at bara konservativir dómarar verða valdir í Hægstarætt. Veljast skulu nevniliga fleiri nýggir dómarar til Hægstarætt, og Bush og hansara fólk vilja hava bara konservativar dómarar at manna henda so týdningarmikla almenna stovn. Ikki minst týdningarmiklan fyri varðveitslu og menning av tí amerikanska demokratiinum.

Tað kann gerast ein vanlukku fyri øll tey í amerikanska samfelagnum, sum standa fyri meira liberalum og tolerantum sjónarmiðjum. Og hesi eru mong. Fær Bush sín vilja kunnu vit gloyma alt um ábøtur á amerikonsku rættarskipanina og frambrot á mongum økjum, har hesi eru neyðug. Dómararnir í Hægstarætti eru teir, sum koma at gera av, hvussu framtíðar samfelagið í USA kann og skal mennast. Bush sjálvur varðveitir bara vald sítt í enn eitt skeið, meðan dómararnir í Hægstarætti verða valdir fyri lívið.

Fær Bush sín vilja, so fer tað at gera meira ilt enn nakað annað og tað fer at gera kluftina millum flokkarnar og samfelagsløg sum heild størri og størri. Tað fer at birta uppundir hatur og stríð, sum vit ikki hava sæð áður í amerikanska samfelagnum. Tað fer at dálka amerikanskan politikk og tað amerikanska samfelagið so nógv, at tað fer ikki at vera liviligt í framtíðar samfelagnum fyri mong, eitt nú minnilutabólkar og ikki minst tey framskygnu, sum vilja eitt USA, ið hyggur frameftir saman við eitt nú demokratisku londunum í Europa. Fær Bush sín vilja, so verður hetta ein stórsigur fyri øll tey, sum ongar broytingar ynskja, fyri tey, sum ikki virða mannarættindini og at øll í samfelagnum hava krav uppá somu viðferð - fyri tey, sum vilja at miðaldarsiðir og lógir skulu varðveitast.

Fyri tey mongu, sum vilja deyðarevsingini til lívs, eru tíðindini um Bushdómararnar at meta sum myrk skíggj á himmalinum. Tí við ikki bert einum lítil meiriluta av konservativum dómarum men við einum framtíðar stórum meiriluta, fer tað heldur at ganga hinvegin. Mong trúðu, at eitt lot var ávegis, tá Hægstirættur herfyri gjørdi av at banna deyðarevsing av ungdómum. Tað bendi á, at ein uppbloyting var á veg. Við at velja sínar egnu konservativu dómstrúðarfelagar í Hægstarætt kunnu vit rokna við, at henda uppbloytingin er søga longu. Vit kunnu bara vóna, at tað eydnast demokratunum og teimum liberalu at forða fyri, at alt ov nógvir av nýggju dómarunum vera konservativir. Tað var einki minni enn ein vanlukka fyri USA, at Bush varð afturvaldur. Hetta fer vanligi amerikanarin at merkja sviðan av, tá og um Bush fær fríar hendur til at velja út sínar egnu konservativu dómarar til Hægstarætt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Navnaleysar sendingar

**Finnbogi Ísakson**



Í fleiri ár hevur Marianna Debes Dahl havt sendingar í Útvarpinum sunnudag við heitinum "Meðan løtur líða". Hon hevur savnað ein hóp av góðum tilfari frá mongum fólkum víða um land og hevur skipað sendingarnar soleiðis, at hesi fólkini umrøða eitt ávíst evni í einari ella fleiri sendingum. Avgjørt áhugaverdar sendingar.

Mær tykir tó, at tað er ein stórur veikleiki, at nøvnini á teimum, vit hoyra, einans verða nevnd fyrst og síðst í sendingini. Heima hjá okkum verður sendingin nógv órógvað av, at vit sita og gita, hvør tað nú er, sum hevur orðið. Serliga argur eri eg, tí eg dugi so illa at gita.

Nú er Elin Winther Poulsen farin undir eina áhugaverda sendirøð um NATO í Føroyum. Tann fyrsta fór í luftina pálmasunnudag og var um mótmælisfundin í kommunuskúlagarðinum í Havn og síðani á Havnarkei, tá Petur Mohr Dam løgmaður kom heim við Tjaldrinum pálmasunnudag fyri 46 árum síðani.

Eisini Elin hevur - eftir hesi fyrstu sendingini at døma - savnað nógv og gott tilfar frá mongum. Veikleikin við nøvnum er tó eisini í hennara sending. Ein segði, at Sigfried Skaale var pápi sín, og tí kundi eg gita, at eg hoyrdi vinmannin Annfinn í Skála og fekk at vita, at tað var hann, sum øll hesi mongu ár hevur verið lagdur undir at hava roynt at framt morðroynd móti Petur Mohr Dam, sum tað onkuntíð hevur staðið í Sosialinum.

Í sendingunum hjá Marionnu er tað vist bara forvitni, sum ger, at eg og fleiri við mær vilja hava nøvnini. Hjá Elini haraftur-ímóti hevur tað týdning við nøvnunum. Alt hatta við NATO hevur verið eitt sera viðkvæmt evni. Fyri mær og helst øðrum við hevur tað stóran týdning at fáa at vita, hvør tað er, sum sigur hvat, tí mær tykir, at virðið í tí sagda er nógv heft at persónunum.

Latið okkum fáa nøvnini í báðum sendingunum. Hvørja ferð, onkur hevur orðið. Kanska vera sendingarnar ikki líka smartar tá. Men tær verða betri.

# Ítróttarmiðstøð - fótbóltshøll?

**Schandorff Vang**
*Skjótisamband Føroya*



Nú verður stórt sligið upp við ætlanum um fótbóltshøll har Klaksvíkar kommuna, Sunda kommuna og kommunurnar í Eysturoynni eru við. Man hevur hug at siga *fótbóltur-fótbóltur-fótbóltur* - enn einaferð!

Tað eru aðrar ítróttargreinar til eisini!

Tá allar hesar kommunurnar hava tikið stig til samstarv um so stóra ætlan, hví eru borgarstjórarnar so stutt skygdir? Hevur eingin teirra gjørt kanning um, hvør tørvur veruliga er norður/eystur økið?

Í seinastu 3-2 sending í SvF kærdu flogbóltsfeløgini Mjølnir og SÍ sína neyð, tí umstøðurnar vóru so ringar. Frælsur ítróttur, svimjing og fimleikur skríggja eftir betri umstøðum í økinum. Hetta eru tær stóru ítróttargreinarnar. Fer m.a. bogaskjótingin ikki betri umstøður heilt skjótt, er vandi fyri, at virksemi í økinum heldur uppat. Er tað tað hesar kommunur vilja?

Hví verður eingin langtíðarætlan gjørt, har ***allur*** ítróttur verður tikin upp á ráð? Hetta serliga tí vit framhaldandi royna at fáa olympiska viðurkenning. Hava vit karmarnar, kundi tað hjálpt til - og hava vit teir ikki, so verður tørvurin enn meiri átrokandi, tí vit hava fingið viðurkenning.

Vit hava stóran tørv á einari ítróttarmiðstøð har hugsað er um allar verandi ítróttir, og eisini um ítrótt, sum møguleiki er fyri at fara undir.

Vit hava tørv á eini ítróttarmiðstøð til tey feløg, sum eru skrásett undir ÍSF við hesum ítróttargreinum í avvarðandi kommunum: fótbólt, hondbólt, flogbólt, svimjing, frælsan ítrótt, fimleik, badminton, judo, borðtennis, bogaskjóting og kurvabólt.

Harumframt kunnu vit seta í gongd aðrar ítróttir, so sum bowling, riflu-/pistólskjóting, tennis, squash, kropsvenjingarmiðstøð og annars tað, sum áhugi kann vera fyri at fara undir.

Tað er ikki rætt, at allir hesir ítróttir skulu fara av landinum í vikuvís á venjingarlegur, tí vit framhaldandi hava sera vánaligar umstøður. Hví ikki gera umstøðurnar so góðar, at vit kunnu fáa aðrar tjóðir at komu higar á venjingarlegu? Hví ikki gera umstøðurnar so góðar, at vit kunnu fáa møguleika fyri at fyriskipa alheims kappingar við umstøðum, sum lúka øll krøv?

Mítt hugskot er - ítróttarmiðstøð heldur enn bara fótbóltshøll.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.